# Seinasti gesturin í ár



*Við sinum 261 metrum tekur Sea Princess at kalla allan molan, nú hon liggur við bryggju í Havn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**261 metra langa Sea Princess, sum mikudagin var á Havnini, er seinasta útlendska ferðamannaskipið, sum vitjar høvuðsstaðin í ár**

VITJAN
*Jákup Mørk*

Tað kann illa sigast annað, enn at punktum fyri ferðamannaárinum verður sett við manér, nú Sea Princess vitjar. Skipið, sum er skrásett á Bermuda, men sum hevur amerikanskt reiðarí, er uttan iva millum størstu førini, sum yvir høvur sleppa inn um molan.

Umborð eru allir hugsandi hentleikar hjá teimum 1.919 ferðafólkunum. Og við 878 starvsfólkum at tæna teimum, skuldi tænastan eisini verið í lagi. Undan ferðini til Føroya, hava hesi verið eitt legg í Dublin, og nú gongur leiðin so til Reykjavík og Nuuk, áðrenn kósin at enda verður sett móti Kanada, áðrenn siglt verður suður eftir fram við amerikonsku strondini.

Tað er Skipafelagið, sum umboðar skipið her í Føroyum, og har verður eisini staðfest, at nógv størri skip enn hetta sleppa illa inn á Havnina.

- Hetta skipið stingur 8,2 metrar, og tað er heilt avgjørt móti markinum, sigur Halgir Dahl Olesen á Skipafelagnum.

*Men verður talan um nógvan vind. Er so nakar møguleiki hjá einum slíkum skipi at sleppa útaftur?*

- Tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki. Teir hava eina øgiliga maskinu við kraftmiklum bóvskrúvum. So tað skal vilja heilt illa til, um tað ikki skal rigga, heldur Halgir.

## FAKTA

**Sea Princess**
**Eigari:** Princess Cruises
**Heimstaður:** Hamilton, Bermuda
**Longd:** 261 metrar
**Breidd:** 32,3 metrar
**Stingur:** 8,2 metrar
**Bruttotonnaga:** 77.499 tons
**Nettotonnaga:** 44.202 tons

# Mary innløgd við verkum



**Krúnprinsessan liggur á Ríkissjúkrahúsinum til eygleiðingar, og Hoffið hevur avlýst hennara luttøku í øllum tiltøkum næstu seks vikurnar**

KRÚNARVINGUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Krúnprinsessa Mary varð týskvøldið innløgd á Ríkissjúkrahúsið við verkum. Krúnprinsessan er sett at eiga um seks vikur, men í gjárkvøldið trekti lívmóðurin seg saman. Hetta er vanligt hjá kvinnum í tíðini áðrenn tær eiga, og talan kann vera um plukk verkir, men møguliga eisini um at føðingin spakuliga er farin í gongd.

Mary er í løtuni innløgd á ríkissjúkrahúsið til eygleiðing, men heilsustøðan er stabil, sigur professor Bent Ottesen av Ríkissjúkrahúsinum í tíðindaskrivi frá Hoffinum. Í tíðindaskrivinum verður eisini at sagt, at krúnprinsurin hevur sitið við líðina á prinsessini alla náttina, men er farin til arbeiðis í morgun.

Hoffið hevur avlýst luttøkuna hjá Mary í øllum tiltøkum, sum vóru á skránni næstu seks vikurnar.

Barnið er nú 34 vikur, og átti sambært læknanum Jerk W. Langer í danska tíðindablaðnum BT ikki at havt nakrar trupulleikar við at yvirliva, um prinsessan átti í dag. Barnið verður ivaleyst eitt sindur lítið, men hetta átti ikki at havt nakar varðandi avleiðingar.




Lærlingur
P/F Wenzel søkir eftir lærlingi til mekaniska verkstaðin.

P/F Wenzel leggur stóran dent á kundanøgdsemi, og tí ynskja vit nærlagni og álit frá umsøkjarunum. Vit seta stór krøv til starvsfólki, men kunnu eisini veita eitt gott og varandi arbeiði undir skipaðum viðurskiftum í góðum arbeiðsumhvørvi, har tað er umráðandi, at starvsfólki trívist.

Ávís førleikakrøv eru ikki beinleiðis neyðug, men fyrimunir eru um viðkomandi hevur S.I.T. (Støðisútbúgving innan tøkni) og koyrikort til persónbil.

Møguligar umsóknir skulu verða okkum í hendi innan **27. sept. 2005.**

Um tú ynskir eina framtíð saman við okkum, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn til

**P/F Wenzel**
**Postboks 3043**
**110 Tórshavn**

Att: Herolvur Hansen
Eisini er møguligt at telduposta umsóknina til: hh@wenzel.fo

www.wenzel.fo



P/F WENZEL
Akranesgøta 5
Tórshavn
Tel 354500